# Føroyar eru reyvin av fjórðu d

**– Skulu vit upp í elituna, verða vit noydd at taka okkum heilt alvorliga saman og at gera alt øðrvísi enn vit gera nú**

FØROYAR OG FRAMTÍÐIN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Føroyar eru reyvin á fjórðu deild og skulu vit upp í elituna, verða vit noydd at taka okkum heilt alvorliga saman.

Tróndur Djurhuus, menningarleiðari á Føroya Tele, legði ikki fingrarnar ímillum á flokstingi tjóðveldisfloksins í Sumba um vikuskiftið.

Opinskáraður og bersøgin segði hann sína meining, tá ið hann var biðin um at halda fyrilestur um, hvar Føroyar skuldi vera í alheimsgerðini.

– Tað er alt annað enn sjálvsagt, at Føroyar fara at menna seg. Í veruleikanum hevur tað ongantíð verið so lítið sjálvsagt, sum nú.

Hann er bangin fyri, at støðan í Suðuroynni er ikki annað enn ein forsmakkur uppá, hvat kemur at henda í øllum Føroyum, taka vit okkum ikki heilt alvorliga saman.

– Í so máta hava suðuroyingar gjørt okkum eina stóra tænastu við at vísa okkum, hvussu støðan verður í øllum landinum, taka vit okkum ikki saman og fara til verka á ein heilt, heilt annan hátt enn higartil.

– Samstundis vísir støðan í Suðuroy øllum føroyingum, hvussu stórur tørvur er á, at vit taka eitt heilt annað skinn um bak.

Menningarleiðarin á Føroya Tele vísti á, at longu ídag er okkara brutto-tjóðarúrtøka ikki meiri enn gott helvtin av tí sum tann norska er fyri hvørt fólki og tveir triðingar av tí hjá dønum.

– Og sum tað gongur í løtuni, verður gloppið bara størri og størri.

Hann sigur, at spurningurin er, hvar Føroyar skulu vera í alheimsgerðini.

– Skulu vit vera í reyvini á 4. deild, ella skulu vit vera í elituni.

Skuldi nakar ivast, er støðan hjá Tróndi Djurhuus tann, at í dag eru Føroyar rætt og slætt í reyvini á fjórðu deild.

Og tá hugsar hann bæði vinnuliga, menningarliga, granskingarliga og politiskt.

## Ein oreingiligur veruleiki

Tróndur Djurhuus sigur, at alheimsgerðin snýr seg ikki um meiri samhandil, tí vit hava havt nógvan samhandil í øldir og hann verður neyvan nogv størri, enn hann er í dag.

– Tað, sum alheimsgerðin serliga snýr seg um, er at fleirtjóða fyritøkurnar vinna longur og longur fram heldur enn staturin.

Hann helt, at tað var burturvið at brúka orku uppá at kjakast um nakað, sum vit onki fáa gjørt við kortini.

– Tað ger akkurát tað sama, hvat vit føroyingar halda um alheimsgerðina, tí hon er ein óreingiligur veruleiki, sum vit onki fáa gjørt við og tí er tað burturspilt at kjakast um tað.

– Í framtíðini verður tað ikki nóg mikið at hava náttúruríkidømi til taks. Í framtíðini verður tað heldur ikki nóg mikið tætt við marknaðin, sum selt verður til.

– Í framtíðini verður tað so, at fleirtjóðafyritøkurnar fara at leggja tey væl løntu menningarstørvini í teimum londum, har kapitalurin kennur seg heima.

– Hinvegin fara tey at leggja tey lægstløntu størvini í londunum, har tey keypa seg til arbeiðsmegina.

## Føroyar mitt ímillum

Tróndur Djurhuus sigur, at sostatt hava føroyingar bara ein einasta møguleika. Og tað er at vit gera okkum so lokkandi, eggjandi og nyttugan hjá teimum stóru fyritøkunum sum gjørligt.

– Vit hava ongan annan møguleika, staðfesti hann.

– Vit verða altíð eitt pinkalítið land, sum aldrin kemur at seta dagsskránna. Vit eru heldur ikki serliga dugnalig og tí hava vit ikki uppiborið at sita til borðs við teimum stóru og sostatt hava vit heldur ikki uppiborið at verða serliga frammarlaga ímilllum heimsins lond.

Hann sigur, at tað er júst hetta, sum verður tann stóra avbjóðingin í framtíðini. Og tað er í evstu løtu at vit taka hesa avbjóðing upp, legði hann afturat.

Hann sigur, at í løtuni er tað so, at tað eru nógv onnur lond, har tað loysir seg betri hjá fleirtjóða fyritøkunum at leggja tey lægstløntu størvini.

Tað eru eisini nógv onnur lond, har tað loysir seg betri at leggja tey hægst løntu størvini.

– Føroyingar liggja mitt ímillum og tí liggja vit sum reyvin í fjórðu deild: Vit eru hvørki vælegnað sum láglønarland og ella sum hálønarland.

– Sum støðan er í dag, fær kapitalurin ikki brúkt okkum og tað er okkara trupulleiki, segði menningarleiðarin á Føroya Tele.

Hann sigur hann hevur hoyrt politikarar í útjaðara í Føroyum, siga, at bjargingin hjá hansara bygd var at flakavirkið var opið at fleiri almenn arbeiðspláss verða flutt til bygdina.

– Eg eri milt sagt ósamdur. Av marknaðarligum orsøkum er tað ógvuliga sannlíkt at nakar fer at leggja ófaklært arbeiði í hansara bygd.

– Og tað er heldur ongin gongd leið at skipa almenn størv, ið hava sum fortreyt at tey vinnilgu størvini eru har eisini.

## Fiskavirking ikki frægari enn ein kiosk

Tróndur Djurhuus sigur, at hvat viðvíkur láglønarlondum, sum Kina, er okkara trupulleiki tann, at har gera tey ikki bara arbeiðið nógv bíligari enn vit kl ára tað.

– Tey gera tað eisini nógv betri, staðfestir hann.

Hann helt, at tað átti at fingið allar kirkjuklokkur at ringt við ófrættakendum tóna, at hoyra at fólk, sum hava skil fyri slíkum, meta, at Fiskavirking kann seljast fyri 160 milliónir.

– Er nógv størsta fyritøka í okkara høvðusvinnu ikki verd meiri enn 160 skallutar milliónir??, spurdi hann rættiliga vantrúgvin.

– Tað er ikki frægari enn ein kiosk!

– Hví er størsta fyritøka í okkara høvuðsvinnu ikki verd eina heila milliard? spurdi hann síðani.

Tá ið tað ikki fæst meiri fyri Føroya Fiskavirking enn 160 milliónir, má tað vera tí, at tað er onki álit á, at hon fer at kasta nakað serligt av sær í framtíðini.

Tað fekk hann at staðfesta, at útgangsstøðið fær ikki verið annað, enn at flakavinnan hevur onga sum helst framtíð í Føroyum,

– Saltfiskaframleiðslan hevur helst eina framtíð, men ikki flakavinnan – uttan so, at vit fara at gera okkara heilt serligt.

## Mugu tosa við hvønn annan

Spurningurin er so, hvat er til ráða at taka.

Tróndur Djurhuus segði, at einastu ráðini eru at í framtíðini mugu vit gera alt øðrvísi enn vit gera í dag.

Og hann legði dent á, at hann meinti alt, tí soleiðis sum vit arbeiða í dag, bæði vinnuliga politiskt og á annan hátt, verða vit ver-



*Tróndur Djurhuus helt, at tað átti at fingið allar kirkjuklokkur at ringt við ófrættakendum tóna, tá ið mett verður Fiskavirking kann seljast fyri skallutar 160 milliónir. Tað er ikki frægari enn ein kiosk, segði hann*